## Givnir at skjóta hval



Norskir hvalabátar, sum hava veitt sildreka við loyvi og kvotu frá Råfisklaget, góvust við veiðini á midnátt í gjárkvøldið eftir boðum frá samtakinum. Orsøkin er fyrst og fremst, at nú er so nógv tvøst á goymslu, at tað stendur á at taka ímóti meiri, skrivar NTB. Í ár hava norsku hvalabátarnir loyvi at veiða 1.052 sildrekar, men í fjør fingu bátarnir bara helvtina av kvotuni. Norska kvotan er býtt sundir ímillum fleiri veiðiøki.

## Fara at rudda í Vági

Í morgin skipar Vágs kommuna fyri almennum ruddingardegi. Samstundis við hetta verður eitt jóansøkubál á Vágseiði, har sangur og røða fara at seta dám á tiltakið. Dagurin byrjar við morgunmati í Framtíðini og síðani verður farið um bygdina at rudda. Á middegi fara bilar og fólk frá kommununi at heinta tað innsavnaða tilfarið og flyta tað út á bálstaðið á Vágseiði. Vesturi á Eiðinum byrjar tiltakið klokkan 18. Her verður felagssangur, eins og fyrrverandi skiparin, Absalon Absalonsen flytur fram røðu. Vinnarin í teirri serstøku ruddingarkappingini verður funnin. Eftir at fest er í stóra bálið bjóðar Vágs kommuna kakao og bollar. Tiltakið endar við at tjóðsangurin verður sungin. Hóast ruddingardagurin ikki er fyrrenn í morgin, ber til hjá fólki at koma við ruski vestur á Eiðið í dag frá kl. 13 til 22. Sami møguleiki verður í morgin frá kl. 13 til 16.

# Føroyingar raskari enn nakrantíð at vitja Rúsuna

**Nýggjastu hagtølini hjá Rúsuni vísa, at hóast rúsdrekkanýtslan í Føroyum er vaksin seinastu árini, er rúsdrekkapolitikkurin hjá tí almenna væleydnaður**

RÚSDREKKANÝTSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Føroyingar hava ongantíð verið so raskir at vitja Rúsuna, sum teir vóru í fjør

Tað vísa nýggjastu hagtølini hjá Rúsuni.

Rúsan er akkurát liðug at gera rúsdrekkanýtsluna hjá føroyingum í fjør upp og tí kann tað nú staðfestast, at føroyingar hava ongantíð verið so nógv í rúsuni, sum í fjør

Í fjør drakk hvør føroyingur yvir 15 ár 7,18 litrar av reinum alkoholi og tað eru 0,38 litrar meiri enn í 2006.

Men hetta er næstan ein heilur litur meiri enn hvør føroyingur í 1993, sum er fyrsta árið, Rúsan virkaði, tí tá drakk hvør føroyingur yvir 15 ár, 6,28 litrar av reinum alkoholi í part.

### Væleydnaður rúsdrekkapolitikkur

Men hóast rúsdrekkanýtslan hjá føroyingum er kvinkað uppeftir síðani Rúsan kom, má kortini sigast, at almenni rúsdrekkapolitikkurin um at tálma nýtsluni, hevur eydnast.

Tað heldur í hvussu so er Elsa Maria Olsen, stjóri í Rúsuni.

- Hyggja vit eftir nýtsluni heilt aftur til 1970, er heilt greitt, at gongdin er tann rætta vegin, nevniliga, at nýtslan av brennivíni er minkandi sum heild og at nýtslan av veikari sløgum veksur.

Hon vísir eisini á, at hóast talan er um ein vøkstur, hevur nýtslan verið nøkunlunda støðug seinastu árini síðani rúsan kom og rúsdrekkanýtslan í Føroyum er framvegis nógv lægri enn í hinum norðanlondunum.

Men samstundis staðfestir hon eisini, at í Svøríki er rúsdrekkanýtslan nógv vaksin í fjør, uttan at hon hevur nakra forklåring upp á tað.

Men havast skal eisini í huga, at okkurt árið, áðrenn Rúsan kom, var nýtslan væl omanfyri tað, hon er nú. Í 1992, sum var síðsta árið, áðrenn rúsan kom, drakk hvør føroyingur yvir 15 ár heilar 8,8 litrar av reinum alkoholi og tað er tað er met – í hvussu so er síðani 1970.

Men í 1987 drakk hvør føroyingur yvir 15 ár 8,10 litrar av reinum alkoholi og í 1988 var talið 7,50 litrar.

Men tilsamans slepst so heldur ikki uttanum, at síðani 1970, er rúsdrekkanýtslan í Føroyum næstan tvífaldað, tí í 1970, drakk hvør føroyingur yvir 15 ár, 4,40 litrar av reinum alkoholi, men í fjør var nýtslan komin upp á 7,18 litrar av reinum alkoholi.

### Drekka veikari

Men undir øllum umstøðum er tað ein greið gongd, sum er heilt týðilig og tað er, at nýtslan av brennivíni minkar, men at nýtslan av øli og víni veksur.

Fyrsta árið, Rúsan virkaði, drakk hvør føroyingur yvir 15 ár 2,90 litrar av brennivíni í part, men í fjør var talið komið niður á 2,43 litrar.

Tá við vit drukku mest brennivín, var eisini metárið 1992, tá ið vit drukkku 4,16 litrar av brennivíni í part fyri hvønn føroying yvir 15 ár.

Hinvegin er nýtslan av víni vaksið úr 0,54 litrum fyri hvønn føroying yvir 15 ár í 1993, tá ið Rúsan kom, upp í 1,16 litur fyri hvønn í fjør.

Bara metárið 1992, drukku vit meiri vín, tí tá var nýtslan 1,47 litur fyri hvønn føroying yvir 15 ár.

Sama rákið sæst í nýtsluni av øli síðani Rúsan kom, tí í 1993 drakk hvør føroyingur yvir 15 ár 2,84 litrar av øli í part, men í hvør var nýtslan 3,58 litrar av øli í part til hvønn føroying yvir 15 ár.

- Miðað hevur verið eftir at fáa fólk at drekka veikari sløg og eg haldi, at tølini vísa, at tað eydnast, sigur Elsa Maria Olsen.

- Tað er ein gongd, sum er til at fegnast um, leggur hon afturat.

Men tað loypir í eyguni, at brennivínsnýtslan vaks bæði frá 2005 til 2006 og aftur frá 2006 til 2007.

Tilsamans er talan um ein vøkstur uppá 0,20 litrar hesi bæði árini og hetta er ein hampiliga stórur vøkstur, tá ið hugsað verður um gongdina í sjálvari brennivínsnýtsluni annars, har nýtslan hevur verið alsamt minkandi seinastu árini.

Elsa Maria Olsen veit ikki, hví so er, men ein forklåring kann vera, at tey hava fingið nógv ymisk sløg av vodka við ymsum spennandi smakkum, sum serliga fangar tey yngru og tað kann hava ávirkað nýtsluna uppeftir.

Annars sigur Elsa Maria Olsen, at tað vísir seg, at føroyingar eru alsamt eru farnir at keypa betri og dýrari vín.

- Føroyingar keypa meiri og meiri eftir dygd, heldur enn bara eftir sjálvum prísinum og tað er eisini ein gongd, sum er at fegnast um, sigur stjórin í Rúsuni.

- Eg haldi, at alt í alt er gongdin eitt tekin um, at føroyingar duga at drekka við máta, sigur Elsa Maria Olsen.

| Ár | Reint alc. | Brennivín | Vín | Øl |
|---|---|---|---|---|
| 70 | 4,40 | 2,00 | 0,16 | 2,24 |
| 71 | 4,70 | 1,84 | 0,20 | 2,66 |
| 72 | 5,60 | 2,20 | 0,25 | 3,15 |
| 73 | 5,60 | 2,36 | 0,28 | 2,96 |
| 74 | 5,30 | 2,28 | 0,34 | 2,68 |
| 75 | 4,80 | 2,20 | 0,45 | 2,15 |
| 76 | 5,20 | 2,28 | 0,56 | 2,36 |
| 77 | 5,90 | 2,68 | 0,52 | 2,70 |
| 78 | 6,10 | 2,76 | 0,52 | 2,82 |
| 79 | 5,60 | 2,64 | 0,46 | 2,50 |
| 80 | 6,00 | 3,08 | 0,55 | 2,37 |
| 81 | 6,10 | 2,96 | 0,51 | 2,63 |
| 82 | 5,90 | 2,84 | 0,44 | 2,62 |
| 83 | 6,40 | 3,04 | 0,46 | 2,90 |
| 84 | 6,10 | 2,64 | 0,36 | 3,10 |
| 85 | 7,10 | 3,56 | 0,48 | 3,06 |
| 86 | 6,70 | 2,96 | 0,45 | 3,29 |
| 87 | 8,10 | 3,96 | 0,61 | 3,53 |
| 88 | 7,50 | 3,80 | 0,49 | 3,21 |
| 89 | 6,90 | 2,96 | 0,60 | 3,34 |
| 90 | 6,70 | 3,20 | 0,62 | 2,80 |
| 91 | 6,70 | 3,04 | 0,76 | 2,90 |
| 92 | 8,80 | 4,16 | 1,47 | 3,17 |
| 93 | 6,28 | 2,90 | 0,54 | 2,84 |
| 94 | 6,40 | 2,87 | 0,58 | 2,80 |
| 95 | 6,40 | 2,62 | 0,58 | 3,07 |
| 96 | 6,50 | 2,69 | 0,65 | 3,16 |
| 97 | 6,60 | 2,68 | 0,66 | 3,25 |
| 98 | 6,60 | 2,69 | 0,70 | 3,24 |
| 99 | 6,59 | 2,63 | 0,73 | 3,23 |
| 00 | 6,75 | 2,74 | 0,81 | 3,21 |
| 01 | 6,90 | 2,70 | 0,90 | 3,30 |
| 02 | 7,04 | 2,69 | 0,89 | 3,46 |
| **03** | **6,93** | **2,54** | **0,90** | **3,49** |
| **04** | **6,76** | **2,38** | **0,99** | **3,39** |
| **05** | **6,63** | **2,23** | **1,05** | **3,35** |
| **06** | **6,80** | **2,30** | **1,10** | **3,40** |
| **07** | **7,18** | **2,43** | **1,16** | **3,58** |

*Hendan talvan vísir, hvussu nógv hvør føroyingur yvir 15 ár hevur drukkið um árið, heilt síðani 1970, til í fjør. Fremsta raðið vísir nøgdina, umroknað til reint alkohol og hini røðini vísa nýtsluna av brennivíni, víni og øli. Rákið er heilt týðiligt, at nýtslan av sterkum brennivíni minkar, men at nýtslan av víni og øli, veksur. Men síðani 1970 er samlaða nýtslan næstan tvífaldað*




*Hendan talan vísir, hvussu nógvir litrar eru seldir av brennivíni, víni og øli, síðani Rúsan fór at virka í 1993, til í fjør. Tað sæst, at nýtslan av brennivíni er minkað eitt sindur, men at nýtslan av víni og øli er vaksin nakað*